## Stuðul til gongugøtu

Tá Eik helt partaeigarafund í Runavík í síðstu viku, handaði Eik Grunnurin Símuni Johannesen, borgarstjóra í Nes kommunu, og Hans Jacob Lamhauge, borgarstjóra í Runavíkar kommunu, 100.000 krónur í stuðuli til at gera eina gongugøtu við ánna Løkin og kring Toftavatn. Ætlanin er at gera ljós og at seta benkur fram við gøtuni, og møguliga verður roynt at fáa laks niðan í ánna. Uppskotið eigur Petur J. Petersen.

## Jelved fer frá í ár

Hevur Berlingske Tidende rætt, fer Marianne Jelved at leggja frá sær sum formaður í radikala tingbólkinum seinni í ár. Sjálv hevur hon ikki nevnt tað við einum orði, men hon ber heldur ikki orð fyri at vera tann, sum avdúkar meiri enn neyðugt. Blaðið sigur seg tó hava fingið at vita frá fleiri radikalum tinglimum, at Marianne Jelved fer at boða frá avgerð síni í heyst. Eingin av tinglimunum vil tó leggja navn til sína meting, skrivar blaðið.



# Eivør og G! á Spotfestivalin

**Eivør Pálsdóttir er nýggjasta høvuðsnavni á skránni fyri SPOT-festivalin i Århus, men harumframt skipar G!Festivalurin fyri tiltaki á festivalinum.**

TÓNLEIKUR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Tað er longu greitt at Boys In A Band, Budam luttaka á SPOT-festivalinum í Århus komandi vikuskiftið. Men nú avdúkar festivalurin, at Eivør eisini luttekur, við somu írsku manning, ið hevur spælt á komandi fløguni Human Child og seinni í ár fer á pall við henni á G !festivalinum. Lena Anderssen skuldi eftir ætlan eisini luttaka á SPOT-festivalinum, men hevur tíanverri avlýst allar sínar konsertir fram til G !.

Umframt føroysku listafólkini verður eitt serstakt G! tiltak, ið verður fríggjakvøldið eftir miðnátt. Tá er G! Festivalurin vertur í vældámda spælistaðnum Studenterhuset, har Boys in a Band, Budam og onnur G!-aktuell listafólk fara á pallin.

Samstarvið við SPOT er eitt av mongu sambondunum, G!Festivalurin hevur knýtt til tónleikavinnu í Evropa, sigur G! Festivalurin í tíðindaskrivi.

G! Festival hevur seinastu árini samstarva við m.a. Atlantic Airways, Norðurlandahúsið/AME og Menningarstovuna í arbeiðinum at skapa tónleikasambond út í heim, so føroyskir tónleikabólkar kunnu sleppa út um landoddarnar at royna flogið. nevnast kann samstarv við Iceland Airwaves í Íslandi, Øya og By:larm í Noregi, Eurosonic í Hollandi, eitt komandi GBOB í London, goNorth og Rockness í Skotlandi, SPOT í Danmark umframt onnur.



Í ár eru fleiri týðandi fet tikin hesum viðvíkjandi og G! er tildømis vorðið limur í ETEP (European Talent Exchange Program), sum arbeiðir fyri, at tónleikarar í Europa ferðast út um síni egnu landamørk at spæla.

ETEP er rótfest í mest týðandi europeiska sýnisglugga festivalinum, Eurosonic.

Eivør spælir á høvuðspallinum, stóra sali í Musikkhúsinum, fríggjakvøldið 1. juni klokkan 19. Budam spælir konsert í minna salinum í dansiteatrinum Gran fríggjakvøldið kl 21.15.

Leygardagin kl. 13.50 lata Boys in a Band størsta pallin, Officerspladsen, upp. Tað verður ikki nógv hvíld hjá boysunum, tí teir fara beint víðari yvir til Keypmannahavnar, har teir seinni um kvøldið spæla konsert í operuni í Christiania saman við G!- og SPOT-aktuella íslendinginum Péturi Ben og føroysku Týr.

**G! aktuellir bólkar á SPOT í ár:**
Eivør Pálsdóttir
Boys in a Band
Budam
Petur Ben (IS)
Hatesphere (DK)

# Braquet á Fjarðafestivalin

**Eins og í fjør luttekur eysturoyarbólkurin Braquet á Fjarðafestivalinum í august í ár.**

TÓNLEIKUR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Braquet hava roynt nógv, síðan bólkurin sá dagsins ljós. Bert fáar mánaðir eftir bólkurin varð stovnaður, komu teir bæði í finaluna í Prix Føroyar ’03 og síðan í Gospel Prix ’04. Í 2005 kom teirra fyrsta fløga út, ið eisini hevur givið teimum nógv jalig aftursvør.

Braquet bleiv stovnaður í 2002 av sangarinum Andreas Højgaard og gittarleikarinum Arna Zachariassen. Eftir hetta kom trummuleikarin Jóhan á Lakjuni og bassleikarin Leivur Vitalis við í tann lívliga bólkin.



Braquet eru kendir sum ein orkufullur bólkur í teirra framførðslum, og liminir geva teirra alt á pallinum. Áskoðarinir fáa óivað eina reyv sparkandi framførslu á festivalinum.

Eftir framførsluna hjá Braquet í fjør skrivaði ummælarin hjá Planet.fo: Konsertin hjá Braquet var sera góð, og teir vóru eftir mínum tykki nógv betri enn nógvir av teimum útlendsku bólkunum.

Vitjið Braquet á Myspace.com/braquet

# - Tað er ikki loyvt at dansa!

**Eigaraviðurskiftini í náttarlívinum í Havn eru nógv broytt seinastu tíðina, og um óroynd fólk við róðrið var orsøkin, vita vit ikki, men bæði byin.fo og Glitnir høvdu gloymt dansiforboðið á Hvítusunnu, og máttu tí í evstu løtu broyta skránna.**

TÓNLEIKUR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Bæði byin.fo og Glitnir fingu hetta vikuskiftið trupulleikar av Halgidagslógini, Glitnir skuldi eftir ætlan havt dans við dansibólkinum Bridge leygarkvøldið, meðan byin.fo skuldu hava dansi endabrest við Showmonnum í REX og ungdómsdiskotek í Cippo leygarkvøldið.

Men dansistøðini kendu eftir øllum at døma ikki nóg væl halgidagslógina, tí hóast tey høvdu lov at hava opið náttina til Hvítusunnu, so var forboðið at dansa eftir miðnátt.

- Rúni Djurhuus frá byin.fo, segði við planet.fo í vikuskiftinum, at talan var um eina misskiljing. Í samráð við Showmenn varð dansurin tí broyttur til eina akkustiska konsert, og av tí, at Showmenn eru ein dansibólkur, varð mett, at teirra endabrestur í REX átti at verða ein dansur, og tí varð gjørt av, at Showmenn skuldu spæla aftur 2. Hvítusunnukvøld og tá var talan um dans. Byin.fo flutti ungdómsdiskotekið til fríggjadagin. Glitnir flutti somuleiðis dansin við Bridge til 2. Hvítusunnukvøld, og skipaði ístaðin fyri Country Karaoke leygarkvøldið.

